

*Øssur og hini blása sum fyri lílvinum*



*Festligur tónleikur á skránni á Norðoyastevnu*

# Tey blása á stevnuna



*Útlendski dirigenturin stendur fyri venjingunum*



*Andras og Eiler tosa um nótar*



*Martin er ein av teimum eldru blásarunum í orkestrinum*

**– Vit royna at spæla eitt sindur meira festligan tónleik á Norðoyastevnu, enn vit annars gera, og tað taka fólk sera væl ímóti, sigur Heri Ellingsgaard, formaður í Klaksvíkar Hornorkestur, sum nú um dagarnar gjørdist 55 ár. Orkestrið noktaði at rýma av Norðoyastevnu, hóast tað hevði ein uppgávu á Toftum leygardagin**

HORNBLÁSTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður*

Summarstevnur og horntónleikur hoyra óloysiliga saman. Hornblástur setir um alt landið dám á stevnurnar, og soleiðis er eisini á Norðoyastevnu, har Klaksvíkar Hornorkestur í 55 ár hevur blást á stevnum og til onnur tiltøk.

– Norðoyastevnan er serliga á tann hátt, at hon verður mett sum endin á spæliárinum hjá okkum. Tá ið Norðoyastevnan er liðug, kunnu vit halda frí fram til september mánað, sigur Heri Ellingsgaard, sum er formaður í Klaksvíkar Hornorkestri.

Tá ið tað fyri meira enn hálvari øld síðani var upp á tal, at klaksvíkingar skuldu fáa hornorkestur úr Havn norður at spæla til Norðoyastevnu, gjørdist tað ein viðvirkandi orsøk til, at klaksvíkingar fingu sítt egna hornorkestur.

Í mai mánaði 1950 varð orkestrið veruleiki, og síðani hevur tað blást til hvørja Norðoyastevnu og nógv onnur tiltøk í Norðoyggjum og aðrastaðni í landinum.

## Vildu ikki rýma úr býnum

Klaksvíkar Hornorkestur spælir til fleiri tiltøk á Norðoyastevnu. Tá ið stevnan verður sett fríggjakvøldið, verða tónar blástir í Vágstúni, og har er orkestrið eisini at hoyra í sambandi við midnáttarsamkomuna leygarkvøld.

Sunnudag verður bæði gingið í skrúðgongu og spælt í Vágstúni, og seinnu árini hevur tað eisini verið vanligt, at orkestrið spælir umborð á Draganum áðrenn kappróðurin leygardag.

– Vit royna at spæla eitt sindur meira festligan tónleik á Norðoyastevnu, enn vit annars gera, og tað taka fólk sera væl ímóti. Til flaggdagshald og grækarismessu eru fleiri fastir sangir, sum vit spæla, men á Norðoyastevnu kunnu vit loyva okkum at spæla léttari tónleik og eisini okkurt fjollut, um tað skal vera, sigur Heri Ellingsgaard.

– Vit kenna tað sum ein skyldu hjá orkestrinum, at vit eru við til at seta dám á Norðoyastevnu. Og tí noyddust vit at geva avboð til landsdystin leygardagin, hóast vit áttu at spælt tá.

Klaksvíkar Hornorkestur spælir vanliga í sambandi við a-landsdystir hjá Føroyum, men nú mátti orkestrið siga nei, nú Norðoyastevnan og landsdystur fullu á sama dag.

– Vit kunnu ikki rýma úr býnum, tá ið Norðoyastevnan er, so Havnar Hornorkestur loysir okkum av til dystin ímóti Sveis leygardagin, sigur Heri Ellingsgaard.

## Slúsa nógv ungfólk ígjøgnum

Hóast tað er nógv lív í á summarstevnum, og øll fólk ikki eru við sítt vanliga vit, so fær hornorkestrið góðan frið at spæla.

– Vit verða ikki órógvað, tá ið vit spæla á Norðoyastevnu. Stemningurin er altíð góður, og vit fáa bara positiv orð við á vegnum, sigur Heri Ellingsgaard.

Orkestrið hevur vanliga millum 25 og 30 fólk við, tá ið spælt verður á Norðoyastevnu, og tað er ein blanding av gomlum kreftum, sum hava verið við í nógv ár, og so yngri fólkum, sum hava spælt í nógv styttri tíð.

– Í løtuni eru nógv ungfólk við í orkestrinum, men tað eru eisini nakrir av teimum gomlu við, og summir sum hava verið við øll árini. Ungfólkini støðast ikki altíð so væl í orkestrinum, tí tey skulu jú burtur á skúla og so víðari, men vit royna bara at fáa so nógv fólk at spæla í orkestrinum sum gjørligt, og so vóna vit, at tey koma viðaftur seinni, tá ið tey kanska flyta heimaftur og fáa sær arbeiði í Klaksvík, sigur Heri Ellingsgaard.

Teir ungu hornblásararnir fáa undirvísing í musikkskúlanum, og tað er ein stór hjálp hjá hornorkestrinum, at góð og skipað undirvísing er í býnum.

Og nú bíðar enn ein Norðoyastevna eftir tí 55 ára gamla hornorkestrinum í Klaksvík.